Hørð kapping í Argentina

Anatoly Karpov fann eyðkenda stórformin fram aftur og vann tepurt framanfyri tvey onnur kend nøvn

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Ein góður endaspurtur varð høvuðssorsøkin at fyrrverandi heimsmeistarin Anatoly Karpov dróg sigurin í land í "Miguel Najdorf Memorial" í Buenos Aires. Tveir sigrar og ein javnleikur í síðstu umførunum, meðan elsti og yngsti luttakarin, ávíkavist Viktor Korchnoi og Teimour Radjabov ikki høvdu eins góðan endaspurt. Tað vórðu hesir tríggir sum stríddust um fyrsta plássið gjøgnum alla kappingina.

Heimsins fremsti kvinnuligi telvarin Judit Polgar fylgdi væl við í fyrru hálvu, men eftir tapini ímóti Karpov og Korchnoi fall hon ímillum. Bretin Nigel Short bjargaði kappingini við tveimum umráðandi sigrum og fekk eitt fjórða pláss, meðan kvinnurnar báðar, Polgar og Xie Jun, deildu fimta plássið. Aftastur bleiv Gilberto Milos (styrkital 2614), sum hevði eina katastrofukapping við bert trimum javnleikum og seks taptum talvum.

Toppurin:

Karpov	6,5 av 9
Korchnoi	6,0
Radjabov	6,0
Short	5,0
Polgar	4,5
Xie Jun	4,5

Hetta var fyrsti kappingarsigur hjá Karpov í longri tíð, og somuleiðis ein sera góð og umráðandi upphiting til trýmanskappingina í desember í Moskva, har hann sleppur av álvara at royna seg aftur ímóti heitastu nøvnunum í nýggjari tíð, nevnliga Kasparov og Kramnik. Hvussu Karpov megnar hesa uppgávu er ringt at meta um, men hann hevur í hesari kapping prógvað at telving hansara enn er heimsklassi.

Ikki vil hann gevast og bert tykist tað sum hann verður betri við aldrinum. Korchnoi telvaði sum at revur í hesari kapping, tapti einki talv — eins og Karpov og Radjabov — og kundi hann saktans vunnið hesa kapping.

Flóvin Tór Næs luttekur saman við Heina Olsen, Heina Danielsen og Miriam Olsen í Amagermeistaraheitinum í talvi

14 ára gamli Radjabov fekk sítt veruliga altjóða gjøgnumbrot í hesari kapping. Hann vísti serliga verjuspæl í heimsklassa tá hann ímóti bæði Karpov og Korchnoi var í trongum skóm, men fekk bjargað sær javnleikar. Tað verður sagt at hann er størri talent enn sjálvur Kasparov, og tað sigur ikki lítið.

Misjøvn úrslit hjá føroyingum

Hetta vikuskifti vórðu fyrstu trý umførini av teimum níggju sum leikast skulu, leikt í Amagermeistaraheitinum. Fýra føroyingar luttaka, Heini Olsen, Flóvin Tór Næs og Heini Danielsen í ovasta bólkinum, og Miriam Olsen í triðovasta bólkinum.

Heini Olsen og Flóvin hava báðir hálvtannað stig meðan Heini Danielsen hevur eitt stig, og er tað undir væntaðu skoruna hjá øllum trimum. Enn eru tó seks umfør eftir og skjótt kann vendast í talvi. 12 ára gamla Miriam er á odda í sínum bólki við hálvumtriðja stigi. Síðsta umfar verður leikt 30. September.

Havnar Telvingarfelag royndi seg í vikuskiftinum í internetliðkapping ímóti hinum meistarafeløgunum í Norðurlondum. Øll liðini sótu í egnum heimlandi og telvaðu via Internet Chess Club. HT endaðu aftast í hesari sterkari kapping, har millum annað nógvir stórmeistarar eisini luttóku. Vinnarir blivu teir úr felagnum Asker úr Norra.

Farodane stuðlaðu føroysku luttøkuna.

Føðingardagskapping í Vestmanna

Í samband við at Vestmanna Talvfelag er vorðið 50 ár í ár, skipa teir fyri serligari liðkapping leygardagin 22. September. Hesar jubileumskappingar hava altíð verið vælumtóktar, og kappingin í Vestmanna er eitt serligt høvi at savna feløgini kring Føroyar áðrenn kappingarárið av álvara byrjar aftur.

Kappingin verður skipað soleiðis at seks mans verða á hvørjum liði, og tíðin verður 25 ella 30 min pr. talv. Kostnaður fyri kappingina er 200 krónur fyri hvørt liðið. Tekning á tlf. 424792 eftir 17.00, ella teldupost: jm@sev.fo í seinasta lagi mikudagin 19. september.

Talvið hesa vikuna

Flóvin Tór Næs (2230) — Børge Nielsen (2024)
AM 2001 (1), 14.09.2001

1.Rif3 d5 2.d4 Rif6 3.c4 e6 4.Ric3 Be7 5.g3 0-0 6.Bg2 Ribd7 7.0-0 dxc4 8.Fc2 c6 9.Rd1 Rib6 [9...Rid5 gevur møguliga svørtum betri mótspæl] 10.a4 Ribd5 11.Rie5 Bd7 12.Rixc4 (Hvítur hevur stórt rásarúm meðan svartur tykist kroystur) 12...Rc8 13.e4 Rib4 14.Fb3 b5 (heldur djarvt) 15.Rie5 Fb6 16.Be3 (Hvítur hevur avgerandi fyrimun) 16...Fb7 (Fc7 hevði helst verið nakað betri) 17.axb5

Ra8 (kann tykjast merkiligt, men alt annað hevði eisini tapt [17...cxb5 18.d5 og svartur missur minst eina finnu]) 18.bxc6 Bxc6 19.Rixc6 Fxc6 20.d5 svartur gavst 1-0 (t.d Fd6 21.e5 Fxe5 22.d6)

Er Óli so ljótur?

Saman við hópin av kendum stórleikarunum, er Óli Johannesen at finna á ljótasta liðnum í Europa

VAKURLEIKI?
Jákup Mørk

Tað er ikki á hvørjum degi, at føroyskir fótboltsleikarar eru at síggja á ymsum úrvalsliðum, sum verða sett saman á ymsan hátt.

Nú er tað tó eydnast føroyska landsliðsskiparanum, Óla Johannesen, at koma á eitt slíkt, men neyvan fara vit heilt skeivt, um vit siga, at Óli í hesum føríinum væl kundi verið hendan heiðurin fyri uttan.

Óli er nevnliga settur á liðið hjá heimasíðuni, www.uglyfottballers.com, og sum navnið sigur, so er hetta ein heimasíða, har ljótastu leikararnir (mett eftir útsjónd) eru at finna.

Stór nøvn

Tað eru ikki eiti á viðleikarar, sum heimasíðan hevur givið Óla á liðnum, har føroyski landsliðsmaðurin tó er somikið vakur, at hann bert er eykamaður.

Talan er um eina 4-4-2 uppstilling, og er liðið sett soleiðis. Í mál er Oliver Kahn úr Bayern München. Verjuleikarar eru Ivan Campo (Real Madrid), Abelardo Fernandez (Barcelona), Frank LeBoef (Marseille) og Christian Ziege (Tottenham). Á miðvøllinum eru Steffan Effenbert (Bayern München), Jens Jeremies (Bayern München), Moreno Torricelli (Fiorentina) og Demetrio Albertini (AC Milan). Álopsleikarar eru Miguel Angulo úr Valencia og Boudewijn Zenden úr Chelsea. Umfram Óla – sum heimasíðan sigur koma úr AGF – eru Zvonomir Boban (Celta Vigo), Carsten Jancker (Bayern München) og Henrik Larsson (Celtic) á beinkinum. Venjari hjá liðnum er hollendingurin, Guus Hiddink.

Umframt at heimasíðan hevur kosið ljótasta liðið í Europa, er eisini ymiskt annað skemtiligt at finna. Millum annað ber til at síggja vakrastu leikarakonurnar, nakrar sonevndar »streakers« og sjálvandi eisini dómarar. Ikki heilt óvæntað fær italski Pierlugi Collina onga kapping í hesum seinasta bólkinum.

Óli Johannesen er at finna á heimasíðuni fyri ljótar fótboltsleikarar, men leggjast skal tó afturat, at talan er um eina gamla mynd…

200 í studio

Um eina viku ferð rockbólkurin 200 í studio í Danmark, har ætlanin er at spæla tónleik inn til eina fløguútgávu

TÓNLEIKUR
Pop.fo

Teir gjørdu vart við seg í Prix Føroyar finaluni, tá teir við øðrvísi tónleiki og framførslu endaðu Prixið. Teir ætlaðu sær ikki at vinna, men vunnu hóast tað undirtøku millum fólk, sum fegnaðust um fríu og óvanligu framførsluna.

Nú ætlar rockbólkurin 200 sær at geva fløgu út.

24. september fer bólkurin í Media Music upptøkuhølini, sum føroyingar hava í Keypmannahavn. Ætlanin er at verða í studio í tvær vikur, og har skulu upptøkurnar gerast til eina fløguútgávu.

Bólkurin 200 varð stovnaður í sambandi við upptøkuna av Rock í Føroyum 2 í 1996-97. Bólkurin vildi tá vísa í verki, at alternativur rokkur kundi syngjast og spælast á føroyskum. Hettar helt bólkurin eydnaðist sera væl, og síðani hevur bólkurin spælt til nøkur fá tiltøk, til dømis Prix Føroyar í ár og í 1997.

24. september fer bólkurin í Media Music upptøkuhølini, sum føroyingar hava í Keypmannahavn. Ætlanin er at verða í studio í tvær vikur, og har skulu upptøkurnar gerast til eina fløguútgávu

Clickhaze tók fýra sangir upp

Fólkini í Clickhaze eru væl nøgd við dagarnar í Lundegaard Studio í Danmark

Clickhaze fekk nógv burtur úr í Lundegaard Studio í farnu viku. Fýra av sangunum hjá bólkinum vórðu tiknir upp, men allir eru ikki endaligir enn

TÓNLEIKUR
Pop.fo

Fólkini í Clickhaze eru væl nøgd við dagarnar í Lundegaard Studio í Danmark. Hetta var høvuðsvinningurin í Prix Føroyar tónleikakappingini, og farnu vikuna hevur føroyski rockbólkurin verið í studio.

Tey tóku 4 sangir upp - Frozen Lullabye, Daylight, Skirvin Flá og Sorrig och Gledje.

- Enn er ikki heilt greitt um vit fara at geva teir út. ella vit einans fara at nýta upptøkurnar sum demo. Onkur av løgunum skal arbeiðast eitt sindur meira við; endaligar røddir og gittar skulu takast upp á onkrum sangi, meðan okkurt av løgunum kann metast at vera liðugt, sigur Jón Tyril, gittarspælari í Clickhaze.

Hóast tað ikki enn er gjørt av, um sangirnir verða givnir út, so verður ivaleyst onkur av upptøkunum at hoyra á onkrum av útvarpsrásunum.